


**Nr. 21** ***8. oktobur 2023*** **83. árg.**

# „Hvat halda tit um Kristus?“

„Pilatus, hvønn dóm fellur tú yvir Jesus Kristus?“

„Eg finni onga søk hjá hesum manni.“

„Og tú, Judas, sum hevur selt Harra tín fyri silvur – hevur tú nakra øgiliga ákæru at reisa ímóti honum?“

„Eg havi syndað, við tað at eg sveik sakleyst blóð.“

„Farisearar, hvat ákæra tit hann fyri?“

„Hann etur saman við tollarum og syndarum.“

„Og tú, Kaifas, høvuðsprestur, hvat sigur tú um hann?“

„Hann hevur spottað Gud, tí hann segði: „Frá hesi stund skulu tit síggja menniskjusonin sita við høgru hond kraftarinnar og koma í skýggjum himmalsins.““

„Og tit hermenn, sum førdu hann til krossin, hvat hava tit at siga um hann?“

„Sanniliga var hesin sonur Guds!“

„Og tit, illu andarnir?“

„Hann er sonur Guds!“

„Jóhannes doyparin, hvat heldur tú um Kristus?“

„Sí, Guds lambið.“

„Og tú, Jóhannes ápostul?“

„Hann er hin bjarta morgunstjørnan.“

„Pætur, hvat sigur tú um Harra tín?“

„Tú ert Kristus, sonur hins livandi Guds.“

„Og tú, Tummas?“

„Harri mín og Gud mín.“

„Paulus, tú hevur jagstrað hann. Hvat vitnar tú ímóti honum?“

„Av sonnum haldi eg alt vera tap móti tí, sum er so nógv mætari: kunnleikin um Krists Jesus, harra mín.“

„Himmalsins einglar, hvat halda tit um Jesus?“
„Tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus.“
„Og tú, himmalski Faðir, sum kennir allar lutir?“
„Hesin er sonur mín, hin elskaði, sum eg havi góðan tokka til.“

Mín kæri lesari, hvat heldur tú um Kristus? Hvønn týdning hevur hann fyri lív títt? Hevur hann **nakran** týdning fyri teg?

*„Cheering Words“ Sept. 1971. – Effie Campbell* umsetti.

# Familjualtar

*„Tá reisti hann altar har og ákallaði navn Harrans, og hann setti har tjald sítt, og har gróvu húskallar Ísaks brunn.“*
*1. Mós. 26,25.*

Tann sannroyndin, at Ábraham bygdi eitt altar og tilbað Harran allastaðni, har hann settist niður (1. Mós. 12,7–8; 13,4–18), var við til at gera hann til tann mannin, hann var. Og eisini hesum viðvíkjandi gekk Ísakur í fótasporum faðirs síns.

Eitt altar er eitt stað, har tú ákallar navn Harrans og tilbiður hann. Vit mugu eina ferð fyri allar geva okkum og alt okkara yvir til Guds, men henda yvirgeving má dagliga endurnýggjast gjøgnum bøn og tilbiðjan. Hetta er andaliga gudsdýrkan okkara (Róm. 12,1–2). Vit mugu í heimum okkara hava tað, sum kallað verður eitt familjualtar.

Allir trúgvandi pápar mugu í heimum sínum byggja eitt altar, og er eingin pápi har, má mamman gera tað. Her er sjálvandi ikki talan um eitt sjónligt altar, men um eitt stað, har familjan hvønn dag samlast um Guds orð og í bøn og tilbiðjan. Ein familja, sum biður saman, stendur saman. Tey børn, sum vaksa upp kring eitt familjualtar, fara at hava lættari við at byggja sítt egna altar, tá ið tey sjálv seta sítt egna heim á stovn.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eitt beinrakið svar

Ein kristin drongur varð ofta argaður av vinmonnum sínum, av tí at hann var á møti hvønn sunnudag. „Tað er ikki neyðugt,“ søgdu teir við hann, „tey siga jú tað sama viku eftir viku.“

„Tað er satt, men sjálvt um eg veit, hvussu breyð smakkar, má eg eta tað hvønn dag fyri at halda likam mítt á lívi. Guds

orð er breyðið hjá sálini, tað má eg eisini eta hvønn dag, um eg vil halda sál mína á lívi."

Etur **tú** Guds breyð hvønn dag?

*Effie Campbell* umsetti.

# Mentanin á Nóa døgum

*Emanuel Minos*

*„Og sum tað gekk á døgum Nóa, soleiðis skal eisini verða á døgum menniskjusonarins: Tey ótu, tey drukku, tey giftust, tey vórðu burturgift, líka til tann dagin, tá ið Nóa fór inn í ørkina, og flóðin mikla kom og týndi øll." Luk. 17,26–27.*

Eg veit ikki, hvat ið tit hugsa um Nóa-tíðina. Kanska halda tit, at har gongur ein einfaldur maður við einari steinøks, træøks ella jarnøks og skal smíða ørkina. Men Nóa-tíðin var ein nógv framkomin tíð við høgari mentan.

Eg havi ferðast víða og havi m.a. verið fleiri ferðir í Amerika. Á míni síðstu ferð har yviri hevði eg verið í fleiri býum og vitjað skandinavisk kirkjulið, og so kom eg aftur til New York. Har heilsaði eg upp á ein byggifrøðing, sum er ein av mætastu byggifrøðingunum nakrantíð í Amerika. Hann koyrdi meg runt í New York og vísti mær háhúsini í Manhattan, sum hann hevði verið uppií at bygt. „Hesir skýskavararnir eru bygdir við øllum tí hátøkniska kunnleika, sum finst í Amerika í dag. Men vit megna ikki at byggja soleiðis, sum teir bygdu á Nóa døgum," segði hann. Eg stóð bara og gapaði. Eg má næstan siga eitt sindur um uppruna mín, so tit skilja hetta betur.

Eg eri føddur í Afrika. Biologiski pápi mín var grikki, og mamma var av egyptiskum uppruna. Fyri at gera eina langa søgu stutta, so kom neyð og sjúka inn í familjuna, og so vóru tað nakrir norskir trúboðarar, sum ættleiddu meg.

Hesin byggifrøðingurin hevði hoyrt hetta og fekk áhuga fyri mær, og tí vísti hann mær runt í New York. So sigur hann, at tá ið tað ráddi um Keops pyramiduna, sum er bygd eini 200 ár fyri Nóa tíð, so kundu teir ikki við øllum tí kunnleika, sum vit hava í dag, byggja nakað, sum svarar til Keops pyramidu. So frammalaga vóru teir vísindaliga á Nóa døgum, og teir høvdu allarhelst amboð, sum eru farin í gloymskuna. Eg veit ikki, um hesin maðurin var trúgvandi, men so sigur hann: „Nóa

tíð var ein tíð, sum var gjøgnumbloytt av synd, óreinsku og spillu." Tað er ikki fyri einki, at Jesus sigur: „Sum tað var á Nóa døgum, skal tað verða, tá ið menniskjusonurin kemur aftur."

Eg havi sagt við Gud, at eg vil ikki ferðast runt og prædika moral, tí tað frelsir ongan; men eg vil boða um blóðið, sum reinsar frá allari synd, og sum kann seta okkum í tað himmalska, so vit kunnu ganga saman við Gudi, sjálvt í eini tíð sum hesi.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Í dag ræður um, at vit boða ta stóru gleðina um tann livandi Harran fyri teimum, sum í hesi vælferðartíð hava notið alt í yvirmáli, men kortini onga gleði eiga. Okkara verð, sum er eyðkend av, at menniskju ikki koma hvørjum øðrum við, tørvar tann boðskapin, at Gud elskar hitt einstaka menniskjað heilt persónliga. Gud brýggjar seg persónliga um eitt og hvørt menniskja.

*e.c.* ums.

---

Eitt ediligt lív er meira vert enn eitt langt lív. Tað veldst ikki um, hvussu **leingi** vit liva, men **hvussu** vit liva.

*e.c.* ums.

---

Spilt sum vit eru av „mikrobylgjumentaliteti", halda vit, at vit kunnu fáa alt eftir ongari tíð, íroknað andaliga búning. Bíblian sigur um Jesus: „Men sjálvur hevði hann seg undan út í oyðimerkurnar og helt bøn." Luk. 5,16. Skalt tú hoyra frá Gudi, krevur tað, at tú hevur stillar løtur einsamallur saman við honum, og at tú livir samsvarandi vilja hansara. Snarvegir finnast ikki.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8. okt. | **Tekstur:** | 1 Mós. 25,24-34; 27,5-17 + 30-36 + 42-43 | **Bíbliuorð:** | 2 Mós 20,15 |
| 15. okt. | **Tekstur:** | 1 Mós. 28,10-22 | **Bíbliuorð:** | 5 Mós. 4,39 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 22** *22. oktobur 2023* **83. árg.**

# Til foreldur

*„Og tú skalt varðveita boð hans og skipanir, sum eg í dag leggi fyri teg, til tess at eydnan má fylgja tær og børnum tínum eftir teg ...“ 5. Mós. 4,40.*

Vit læra betur um tey andaligu virðini við at síggja onnur liva eftir teimum. Vit læra ikki so væl hesi virði, um onkur bara undirvísir okkum í teimum. Sum foreldur flyta vit alla tíðina okkara virði til børn okkara.

Tí eiga vit at læra tey, hvussu tey skulu biðja. Vit skulu hjálpa teimum at skilja, at bøn er eitt amboð, sum okkum er tørvur á, tá ið vit byggja upp eitt lívlangt vinalag við Gud. Og tey fara at fáa brúk fyri hansara vinalagi, serliga tá ið tú ikki ert har at hjálpa teimum.

Sig við tey, at tey fáa líka so skjótt samband við Gud, sum tá ið vit trýsta á „snarkall“ á telefonini. Sig við tey, at Gud er at hitta alt samdøgrið. Vís teimum tað í orði eins væl og í gerningi.

Tað er frá tær, at børn tíni læra Gud at kenna. Annaðhvørt tú vísir kærleika og umsorgan, ella tú einki vilt hava við onnur at gera og ert kaldlig, so koma børn tíni at síggja Gud gjøgnum teg. Til dømis hevur Gud ongantíð so nógv at gera, at tú ikki kanst órógva hann. Hann sigur altíð við okkum, at hann elskar okkum, og hann fer ongantíð út um mark – vit kunnu læra av tí!

Lær tey at síggja Gud í øðrum menniskjum. Tá ið børn tíni uppliva, hvussu Gud virkar í teirra lívi, so fara tey so smátt at síggja, hvussu Gud arbeiðir í lívinum hjá øðrum. Á tann hátt fara tey at hámeta onnur og virða tey, og avleiðingin verður, at

onnur viðurkenna og virðismeta tey – tað fær tey at kenna seg trygg!

Send tey ikki bara avstað – far sjálv við teimum. Børn tíni hava tørv á at trúgva og at hoyra til onkustaðni. Sig við tey, at líka sum ein likamslutur, sum ikki er fastur uppi í kroppinum, doyr, so fara tey eisini at doyggja andaliga, um tey ikki hoyra til eina meinigheit. „At hoyra til“ merkir, at tey altíð hava eitt stað at fara! Bíblian sigur: „Lær tú óvitan um vegin, hann skal halda, so man hann enn á gamalsaldri ikki víkja av honum.“ Orðt. 22,6. Tað besta, tú nakrantíð kanst gera fyri børn tíni, er at vísa teimum rætta vegin!

*„... et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Ein andans úthelling

*Emanuel Minos*

*„Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi.“ 1. Jóh. 1,9.*

Lógir skapa sjónarmið, sjónarmið skapa rák, rákið skapar andsmaktir. Tað er tí, at eg biði, at Heilagi Andin skal koma yvir land og fólk, so at Heilagi Andin má fáa loyvi at loysa hesar andsmaktir, sum eru frammi í tíðini. Eg trúgvi einki upp á moralprædikur. Tú kanst prædika moral, til tú verður bláur í andlitinum, og eingin verður frelstur. Men eg trúgvi upp á Jesu blóð.

Í Svøríki syngja tey ein so undurfullan sang. Hann er 150 ára gamal. „Hvitare enn snö. Två meg i det rinnande blodet, så jag blir hvitare enn snö.“ Um synd tín er lítil sum ein prikkur ella ómetaliga stór, tað er ikki tað, sum veldst um. Tað finst eitt blóð, nevniliga „Blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd.“ (1. Jóh. 1,9). Vit kunnu gerast hvítari enn kavi vegna Jesu blóð. Mátti Gud fingið loyvi at gripið hjørtu okkara.

Eyðkent fyri Nóa-tíðina við øllum syndum sínum er, at menniskju fáa eitt mektugt frelsutilboð, sum verðin ongantíð hevur sæð makan til. Í 1. Mós. 7,1 lesa vit: „Tá segði Harrin við Nóa: Gakk tú og alt húski títt inn í ørkina.“ Á, dett veldiga frelsutilboð. Har kemur fílurin saman við konu síni skjølkandi beina leið inn í ørkina. So kemur leyvan. Hon ristir sítt faks

og fer saman við konu síni beina leið inn í ørkina. Tey høvdu bara instinkt, men tey hoyrdu kallið. So kom giraffurin, fjálturstungin og hugdi rundan um seg, við sínari lítlu konu, og tey fara beina leið inn í ørkina. Nú sigi eg við teg: „Gakk tú og alt hús títt inn í ørkina!“

Vita tit hvat, vinir mínir? Eg trúgvi, at ein veking kemur í endatíðini. Eg trúgvi, at Andin verður útheltur í endatíðini. Hví? Tí tað stendur í míni Bíbliu: „Og tað skal verða á hinum evstu døgum, sigur Gud, tá skal eg hella út av anda mínum yvir alt hold.“ (Áps. 2,17). Eg bíði ikki eftir nakrari oyðing. Eg bíði eftir einum veðri úr himli við Andans úthelling. Eg sigi: „Kæru vinir, blívið fyltir við Andanum.

Á, teir sannleikar. Um tú lesur bæði brøvini hjá Pæturi, serliga tað seinna, so kemur Pætur við fleiri beinleiðis og óbeinleiðis sannleikum: Jesus Kristus er ørkin! Jesu blóð reinsar frá allari synd! Ein evarska lítil blóðsdropi er nóg mikið at fella ein brotsmann, so hann fær lívlanga fongsulsrevsing vegna genini, ella ílegurnar. Men ein lítil dropi frá Jesu blóði á Golgata reinsar teg frá allari synd, og so er tá eingin fordøming fyri tann, sum er í Kristus Jesusi. Á, tú kanst uppliva Jesu blóð í dag. Ein lítil blóðsdropi reinsar teg og heilagger teg, uttan mun til, um syndirnar eru mangar ella fáar.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eg roykti Matteus…

„Ájú, eg kann taka ímóti hesi Bíbliuni, sum tit royna at noyða upp á meg; men eg fari bara at skræða bløðini úr og brúka tey at balla mær sigarettir,“ segði maðurin sjálvklókur við hjálparmannin hjá Bíbliufelagnum í Zimbabwe.

„Hatta var greið tala,“ svaraði Kambarami, „tað mást tú sjálvur gera av. Men lova mær, at tú ið hvussu so er lesur síðuna, áðrenn tú ballar tær eina sigarett úr henni!“

Og maðurin gav honum eitt hálvt lyfti um hetta.

Fleiri ár seinni luttók Kambarami á einari kristnari ráðstevnu. Mitt undir einum fyrilestri steðgaði talarin brádliga, tí hann hevði sæð Kambarami niðri í samkomuni. Hann peikaði á Kambarami og segði:

„Hasin maðurn minnist óivað ikki meg, men fyri 15 árum síðani gav hann mær eitt Nýggja Testamenti, sjálvt um eg segði honum, at eg bara fór at brúka síðurnar sum sigarettpappír.

Eg  roykti Matteusarevangeliið, eg royki Markus og Lukas, men so kom eg til tann triðja kapittulin í Jóhannesarevangeliinum og las vers 16:

**„Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív.**“

Frá tí løtuni brúkti eg ikki longur bíbliusíðurnar sum sigarettpappír. Lív mítt fekk eina heilt nýggja byrjan og eitt heilt nýtt innihald!“

Í dag er hesin fyrrverandi bíbliuroykjarin í Zimbabwe trúgvandi og tænir Jesusi. – Ja, hetta bíbliuorðið er satt: „Guds orð er livandi og máttmikið …“ Hebr. 4,2.

„*Krigsropet*“ – *Effie Campbell* umsetti.

# Tey lítisverdu

Tey menniskjuni, sum onnur halda hava lítið upp á seg, verða ofta nettupp brúkt av Gudi at boða evangeliið. Tað eru nógv dømi um tað í Bíbliuni:

Tað er syndarinnan, sum salvar Jesu føtur – ikki Símun farisearin.

Tað er tann fátæka einkjan, sum gevur alt, sum hon eigur – ikki tey ríku.

Tað er ein fremmandur sámariubúgvi, ið hjálpir tí neyðstadda – ikki presturin og levitturin.

Tað er hin vanvirdi Sakeus, sum letur aftur tað, ið hann hevur kraft ov mikið – ikki hini.

*e.c.* ums.

---

Gerist lærisveinar og gerið teir gerningarnar, ið Jesus hevur biðið okkum gjørt. Flótið ikki við streyminum og verðið ikki sum heimurin.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 22. okt. | **Tekstur:** | 1 Mós. 29, 1-30; 31,2-3; 33,1-11 | **Bíbliuorð:** | 1 Mós 31,3 |
| 29. okt. | **Tekstur:** | Matt. 28,18-20;<br>Mark. 10,13-16; 1 Pæt. 1,3 | **Bíbliuorð:** | Mark. 16,16a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74